

## Nýtt farmaskip í flotan

Eitt farmaskip afturat er komið í føroyska flotan. Talan er um norska sjálvlossaran Fjordbulk, sum trý feløg – tvey føroysk og eitt danskt – ígjøgnum eitt nýtt felag hava keypt. Tey føroysku feløgini eru Sp/f Lón og P/f Articon. Nýggja felagið, sum hevur keypt skipið, eitur Bal-Bulk. Í løtuni er skipið í dokk í Noregi og verður liggjandi har í nakrar dagar afturat og fer síðani í rakstur. Skipsmeklarafyritøkan Maretec hevur avgreitt skipakeypið, men keypararnir vilja ikki upplýsa keypsprísin. Nýggja farmaskipið fær heimstað í Tórshavn.

*Kelda og mynd: Skipini.com*

# Eitt amputerað C



*Kaj Leo Johannesen, floksformaður, vísti á landsfundinum á, at veðurlíkindini fyri Føroyar eru broytt seinasta góða árið, og hann helt fyri, at tann, sum ikki sær, at eitt djúpt lágtrýst er á veg, vil ikki síggja tað*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Javnaðarflokkurin segði bæði undan seinasta og næstseinasta vali, at hvørt oyra, sum skorið verður av ríkisveitingini, fer at ganga út yvir vælferðarøkið. Hetta er eisini so satt, sum tað er sagt. Men hvar er tann steindeyði og amputeraði Javnaðarflokkurin, nú júst vælferðarøkið stendur fremst fyri skotum, spurdi formaður Sambandsfloksins á landsfundi**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landsfundi Sambandsfloksins reisti Kaj Leo Johannesen, formaður floksins, spurningin, hví Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin í samgonguskjalinum vilja taka 200 miljónir krónur frá vælferðarøkinum, sum er ætlaði niðurskurin í ríkisveitingini í hesum valskeiði.

- Hetta er einki annað enn skelkandi og ábyrgdarleyst, tí vit trúðu veruliga, at hesir flokkar høvdu eitt frægari grundarlag at byggja á. At Tjóðveldi við sínum misskilta fullveldispolitikki roynir at snúgva sær undan tí veruleika, at búskapurin verður etin upp innanífrá, er kanska lættari at skilja, helt floksformaðurin fyri.

### Amputeraður og steindeyður

Hann segði, at henda vanstýring, sum hann rópti ætlaða niðurskurin í ríkisveitingini, setir nakrar nýggjar spurningar fram í ljósið.

- Hvar er ábyrgdin, hvar er samhaldsfesti, hvar er samvitskan? spurdi Kaj Leo.

Tað undrar serliga formann Sambandsfloksins, at Javnaðarflokkurin, sum situr við stjórnarleiðsluni, gongur á odda í øllum hesum.

- Hetta man vera eitt vónbrot – ikki minst fyri javnaðarfólk, legði hann aftrat.

Kaj Leo vísti á, at Javnaðarflokkurin bæði undan seinasta og næstseinasta vali segði, at hvørt oyra, sum skorið verður av ríkisveitingini, fer at ganga út yvir vælferðarøkið.

- Hetta er eisini so satt, sum tað er sagt. Men hvar er tann steindeyði og amputeraði Javnaðarflokkurin, nú júst vælferðarøkið stendur fremst fyri skotum? spurdi hann.

Og formaður Sambandsfloksins legði aftrat:

- Nei, her er veruliga brúk fyri at busta støvið av sanginum og byrja at syngja umaftur, sum onkur gjørdi, at "her má vend koma í" – og tað ongantíð ov skjótt!

### Skapa tryggleika

Kaj Leo segði, at politikkur og umsiting av landsins ognum er ikki eitt spæl, har tú bara blandar kortini av nýggjum og heldur fram, sum um einki var hent.

- Tað ber slett ikki til at spæla við hundraðtals miljónum krónum og enntá miljardum - uttan at vísa ábyrgd og tryggja sær, at landið veruliga er í góðum hondum. Ein samgonga kann ikki einans byggja á neyðloysnir. Neyðugt er við loysnum og lyklum til at loysa avbjóðingarnar, sum hann tók til.

Floksformaðurin ásannaði kortini, at Sambandsflokkurin hevur ikki loysnir upp á alt.

- Nei, sjálvandi hava vit ikki tað. Men sleppa vit fram at landsins leiðslu aftur, áðrenn ov seint er, kunnu vit verða við til aftur at skapa tryggleika millum fólk. Vit fara ikki at hækka skattir og avgjøld, legði Kaj Leo.

Hann vísti á, at altjóða serfrøðin herfyri staðfesti, at fíggjar-og búskaparpolitikkurin seinastu fýra árini hevur eydnast sera væl.

- Tí skal eingin ivi vera um, at vit ætla at halda fram á somu kós, so skjótt vit aftur – og vónandi innan stutta tíð - fáa møguleikan at mynda landsins stjórn. Sum nú er, sær tíverri út til at ganga skjótt hjá sitandi samgongu at tøma lastina. Líkt er enntá til, at hetta í løtuni sær út til at vera eitt mál í sær sjálvum. Tað er skelkandi og kann ikki steðgast nóg skjótt, segði Kaj Leo.

### Lágtrýst á veg

Floksformaðurin vísti á, at veðurlíkindini fyri Føroyar eru broytt seinasta góða árið, og hann helt fyri, at tann, sum ikki sær, at eitt djúpt lágtrýst er á veg, hann vil ikki síggja tað.

- Tað er okkara størsta skylda sum politikarar og flokkur at gera vart við komandi umstøðurnar í okkara landi.

Hann segði, at neyðugt er at gera sær greitt, at Føroyar mugu tillaga seg til broyttar umstøður, taka avbjóðingarnar, sum liggja fyri framman – og loysa tær skilagott.

- Gera vit ikki tað, ber heldur ikki til í góðari tíð at tryggja okkara borgarum framhaldandi vælferð. Vælferðin verður ikki tryggjað við at gera sum strutsurin – at stinga høvdið í sandin við hugburðinum, at "tað man fara at ganga kortini…", segði Kaj Leo Johannesen.



*Politikarar í Sambandsflokkinum stinga høvdini saman í steðginum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*